VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.



Veðrið leygardgin:
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin strúkur í vindi av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur. Týsdagin upp í strúk í vindi av útsynningi og ælingur. Hitin millum 5 og 9 stig.

Dorte sýnir fram kurvar, myndir og troyggjur

TÍÐINDASKRIV

Dorte Tilma, sum flættar kurvar, málar og bindir sum frítíðarítriv, hevur eina framsýning við kurvum, myndum og troyggjum í Sirri (Fútastovu) í Havn.

Dorte sigur sjálv, at heilt frá barnsbeini hevur tónleikur, litir, rytmur, klangur, mynstur og linjur fingið stóra rúmd í hennara lívi. Hetta merkir hon eisini sum vaksin antin hon er til arbeiðis sum organistur, um hon teknar, bindur, vevar, flættar píl ella á onkran annan hátt ger okkurt handaligt.

Tekniblokkurin er altíð við í ferðaskjáttuni, somuleiðis stokkar og tógv, og vevurin er sum flyglið tvey tey mest umráðandi amboðini í húsinum.

Áhugan fyri píli byrjaði fyri einum 14 árum síðani hjá Bent Winkler. Síðani hava fólk úr m.a Írlandi, og Onglandi verið íbirtarar til framhaldandi arbeiðið við pílaflætting.

Dorte hevur havt fleiri framsýningar av handaligum arbeiði í Danmark. Hon hevur tey seinastu 4 árini verið fastur framsýnari í Galleri Damcottage í Vringsted í Vensyssel. Hennara seinasta ferðaframsýning var í gallarínum hjá Marianne Isager í Århus.

Dorte Tilma er fødd í 1952, og hon er útbúgvin á Det Jyske Musikkonservatorium við kirkjumusikalskari diplomeksamiu. Hon er í løtuni organistur við Langeneskirkjuna í Århus og lærari við Vestervig kirkjumusikkskúla. Hon er eisini kórleiðari hjá kirkjukórinum Ljómi í Vági.

Framsýningin í Sirri í Havn er opin frá fríggjadegi tann 19.11.04 til nýggjárs.

Dorte Tilma sýnir fram kurvar, myndir og troyggjur í Sirri fram til nýggjárs

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	–
Nuuk	÷3
Qaqortoq	÷5
Ammassalik	÷6
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	÷2
Seyðisfjørður	÷2
Tórshavn	3
Lerwick	6
Aberdeen	10
London	13
Tromsø	÷6
Bergen	0
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	4
Helsinki	÷4
Moskva	÷2
Berlin	9
Warzawa	4
Kiev	6
Bukarest	8
Paris	11
Madrid	10
Róm	15
Malorca	17
Athen	14
Malta	16
Tunis	–
Beijing	–
New Dehli	–
Bangkok	32
Jakarta	–
Sydney	–
New York	12
Miami	22
Los Angeles	20
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	19

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 973 hPa. yvir Suður-Svøríki fer eystureftir. Eitt hátrýst, 1039 hPa yvir Grønlandi breiðir seg í landsynning.



Hátrýstið við Ísland verður yvir Føroyum leygardagin. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 16/11 kl. 06⁰⁰–17/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,7°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 8,5 mm – mált frá 16/11 kl. 06⁰⁰–17/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 100,6 mm

Vika 47 – 17. novemb.
Vinnaratøl: **05 - 15 - 16 - 29 - 34 - 46**

Eykatøl: **11 - 41**

Supertal hesa vikuna: **28**

6 vinnaratøl:	**4.444.709,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**94.228,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.282,- kr.**
4 vinnaratøl:	**107,- kr.**
3 vinnaratøl:	**35,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

14. november: Mánin næstur jørðini
19. november: Fyrra kvarter

Kelda. Almanakk'in 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
19. nov	—	12.31	11.31	—	11.46	—	01.53	14.31	02.53	15.31	10.46	23.24	09.46	22.24	00.08	12.46	01.08	13.46	—	12.16	00.53	13.31
20. nov	01.09	13.45	00.09	12.45	00.24	13.00	03.09	15.45	04.09	16.45	—	12.00	11.00	23.36	01.24	14.00	02.24	15.00	00.54	13.30	02.09	14.45
21. nov	02.21	14.41	01.21	13.41	01.36	13.56	04.21	16.41	05.21	17.41	00.36	12.56	11.56	—	02.36	14.56	03.36	15.56	02.06	14.26	03.21	15.41
22. nov	03.02	15.22	02.02	14.22	02.17	14.37	05.02	17.22	06.02	18.22	01.17	13.37	00.17	12.37	03.17	15.37	04.17	16.37	02.47	15.07	04.02	16.22

5 707265 100050 >